# Faroe Seafood tveir trolarar fyri 80 miljónir krónur

**- Rókur og Lerkur eru góð og rúmlig skip. Hevði felagið bygt hesi skipini, høvdu tey helst kostað einar 120-140 miljónur krónur, sigur Jónsvein Knudsen, útgerðarmaður**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Lerkur stendur nú á Tórshavnar Skipasmiðjuni, har hann verður longdur. Á skipssíðuni sæst merkið, har hann verður skorin av miðskips*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Nú eru báðir trolararnir, sum Faroe Seafood hevur keypt úr ávikavist Írlandi og Skotlandi, komnir til landið. Teir eru merktir við bókstavunum FD og eru heimahoyrandi í Runavík.

Rókur, sum er keyptur úr Írlandi, var hin fyrri, sum kom, og herfyri kom so eisini Lerkur, sum er keyptur úr Skotlandi.

Meðan Rókur seinastu vikurnar hevur ligið við bryggju í Saltangará, hava fólk hjá maskinverkstaðnum FJM í Runavík sett nýggja verksmiðju í skipið, og eisini eru onkrar broytingar gjørdar í lastini, soleiðis at lættari verður at fáa fiskin upp á pláss.

Væntandi verður Rókur klárur til fiskiskap nakað eftir 20. august.




*Bæði Rókur og Lerkur hava bókstavirnir FD og eru heimahoyrandi í Runavík. – Hetta eru tvey góð og rúmlig skip, sigur Jónsvein Knudsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen...*

### Góð og rúmlig skip

Jónsvein Knudsen, ið er virkandi útgerðarmaður hjá Faroe Seafood, sigur, at Rókur, sum faðir og synir áttu í Írlandi, er í góðum standi. Hetta er eitt væl viðfarið og væl røkt skip.

- At síggja til, er Lerkur, sum kom úr Skotlandi, ikki líka vakur sum Rókur, men talan er í fyrsta lagi um "shining", sum skal til.

Hann sigur, at hetta skuldu verið tvey góð og rúmlig skip, sum eru bygd ávikavist í 1999 og 2000. Arbeiðsdekkini eru innilokað, og síðan er troldekkið omanfyri.

Maskinurnar á báðum trolarunum eru júst yvirhálaðar í Skagen, áðrenn skipini komu heim til Føroya.

- Skrokkarnir eru smíðaðir í Pólandi og Hálandi, og síðan hevur Carstensens Værft í Skagan gjørt skipini liðug.

Jónsvein sigur, at skipini eru bygd eftir somu tekning, men Rókur er upprunaliga bygdur longri enn Lerkur. Annars eru skrokkarnir og skipini annars eins.

### Lerkur leingjast

Lerkur, sum var hin seinni, ið kom, stendur nú á Tórshavnar Skipasmiðju, sum fer at seta eina sektion upp í skipið. Á myndini sæst strikan, har skipið verður skorið sundur í tvey. Síðan verður sektion sett miðskips sum ger, at skipini eftir leingjanina av Lerki fara at hava somu longd.

Jónsvein Knudsen væntar, at leingjanin fer at taka einar seks vikur ella so.

- Tá Rókur verður liðugur um einar 14 dagar ella so, fer hann í fyrstu syfti at partrola saman við Baki ella Stelki. Bakur og Stelkur skulu til Klaksvíkar á beding, har maskinurnar skulu yvirhálast og klassast. Men bara annað skipið fer norður í senn.

Hann væntar, at hvørt skipið verður úr vinnu í einar 14 dagar.

- Hetta merkir, at tá ið Bakur og Stelkur eru lidnir í Klaksvík, verður Lerkur liðugur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Tá halda Bakur og Stelkur fram sum higartil, meðan Rókur og Lerkur fara at partrola.

# 21 fiskimenn við Róki og Lerki

**Sjey mans verða umborð á Róki og Lerki í senn, men skipini fara at hava tríggjar manningar, sum vanligt er á isfiskaveiði**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

21 mans verða knýttir at nýggja parinum hjá Faroe Seafood.

Útgerðarmaðurin, Jónsvein Knudsen, sigur, at teir koma at fáa brúk fyri nøkrum monnum aftrat, nú nýggju skipini skulu mannast um einar seks vikur ella so.

- Nakrir mans hava hingið eftir í felagnum, síðan teir seinastu av gomlu kuba-trolararnir vórðu seldir, men okkum kemur at vanta nakrar mans.

Hann heldur kortini ikki, at neyðugt er at seta alla manningina, fyrr enn bæði skipini eru um at verða klár. Men skiparar og maskinmenn eru settir til allar bátarnar.

- Jú, onkur hevur ringt tog spurt um kjans, sigur Jónsvein.

### Yvirmenn settir

Teir, sum koma at skiftast um at føra Rók og Lerk, verða feðgarnir, Ólavur og Rúni Samuelsen og Róin Joensen.

Umborð á Baki og Stelki verða brøðurnir Kjartan og Jákup Pauli Egholm og Eyðfinn Johannesen.

- Vit koma soleiðis at hava tríggjar skiparar til hvørji tvey skip, sigur útgerðarmaðurin.

### Nýbygningarnir

Skipini, sum Faroe Seafood letur byggja í Vigo í Spaniu, verða ætlandi klárir at loysa seint í hesum árinum.

- Sambært sáttmálanum skulu skipini verða klár fyrst í november, men eg ivist í, um hetta fer at halda heilt. Vit vænta heldur, at skipini verða klár umleið ein mánaða seinni.

Jónsvein sigur seg tó vóna, at nýbygningarnir kunnu gera ein ella tveir túrar, áðrenn árið er úti.

Íløgan, sum Faroe Seafood hevur gjørt í Rók og Lerk, verður einar 80 miljónir krónur, tá skipini eru klár at fara til fiskiskap.

- Hevði felagið bygt hesi skipini, høvdu tey helst kostað einar 120-140 miljónur krónur, sigur Jónsvein Knudsen.